# Schuster krevur Ronaldo

Kosta hvat tað kosta vil, so vil týski venjarin hjá Real Madrid hava fatur á Ronaldo. – Fyri ein spælara, sum er somikið góður, mugu vit gjalda tað, sum er neyðugt. Sjálvandi veit eg, at Manchester United ikki vil sleppa spælaranum, tí ein slíkan letur tú ikki fara uttan víðari. Og tí má felagið bara gjalda so nógv, sum tað er neyðugt, fyri at at fáa fatur á honum. Samstundis ljóðar, at Real Madrid nú vil sleppa at tosa við Ronaldo sjálvan.



# Formenn á fund

Mikudagin eru formenninir í limafeløgunum hjá Fótbóltssambandinum innkallaðir til fundar í Havn. Á fundinum fer starvsnevndin at kunna um ymisk viðurskifti í fótbóltssambandinum, eitt nú um málið við tjóðarleikvøllinum og eftirmetingina av sjónvarpingini av finaludystinum um Løgmanssteypið. Fundurin verður mikudagin 25. juni kl. 17.30, og ætlanin er at enda dagin við at hyggja eftir fyrru hálvfinaluni í EM-kappingini á stórskíggja.




*Sandoyingar eru nú heilt illa sperdir í botninum. Eisini sunnudagin var spælið á góðari leið, men úrtøkan hevur verið alt ov soltin seinastu nógvu dystirnar*
*savnsmynd*

# Niðurflyting hóttir B71

**Nú sær av álvara svart út hjá B71, sum ikki hevur vunnið ein dyst síðan 27. apríl. Í gjár tapti B71 0-2 móti NSÍ heima á Sandi**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

*B71*

*NSÍ*

Jagstranin eftir stigum í ævigu kappingini um yvirliving í Formuladeildini helt fram hjá B71, tá ið teir í gjár fingu vitjan av meistaraliðnum, NSÍ. Gongdin hjá NSÍ hevði verið góð undan dystinum, har teir høvdu vunnið tveir teir seinastu dystirnar við málúrtøkuni 5-0. Gongdin hjá sandoyingum hevur haraftur-ímóti verið ræðulig, og vit skulu leita okkum heilt aftur til 27. apríl í ár, áðrenn vit finna seinasta sigur hjá teimum. Tá vunnu teir 3-1 á Skála.

### NSÍ klárir frá byrjan

Sum ikki einaferð kom B71 afturúr í fyrra hálvleiki. NSÍ legði bragdliga fyri, og tryggjaði sær tvey hornaspørk beinanvegin. Hetta seinna hornasparkið endaði við máli. Bólturin kom úr brotsteiginum til Hjallgrím Elttør, sum smekkaði til. Jóhan Troest Davidsen stóð á rætta staðnum, og kundi beina skotið í málið til 1-0 til NSÍ. Hetta var fyrsta málið hjá unga landsliðsver juleikaranum.

B71 át seg so við og við inn aftur í dystin, og til endans sótu teir á stórt sæð øllum. Við størri neyvleika høvdu teir eisini havt javnað, tí málmøguleikar manglaðu teir ikki. Hóast hetta endaði fyrri hálvleikur 1-0 til NSÍ, og hetta mundu runavíkingar vera best nøgdir við.

### Tvífaldaðu leiðsluna

Eftir eitt korter í seinna hálvleiki økti NSÍ um leiðsluna til 2-0. Málið kom eftir eitt væl spælt álop, sum serbiski Milan Pejcic átti seinasta fótin á.

Eftir málið tóktist luftin at vera farin úr sandoyingum, og trýstið, sum teir løgdu á NSÍ eftir fyrsta málið, var als ikki at finna. NSÍ hevði tamarhald á, og tað var eisini um reppið, at teir øktu til 3-0. Serliga var Hjallgrím Elttør tætt við tíggju minuttir fyri leiklok, men skot hansara rakti tvørtræið.

Dysturin endaði 2-0 til NSÍ, og teir hava nú vunnið seg upp á 2. plássið. Hetta er møguliga bara til láns, tí B36 og HB hava framvegis ein dyst til góðar. B71 sær út til at dragna í botninum, og trupult er at peika á, hvussu teir skulu bjarga sær lív í Formuladeildini.

## Verjuspælið riggar betur

Johan Nielsen, venjari hjá NSÍ, er serliga fegin um, at verjuparturin nú riggar, sum hann skal. Vit spurdu hann, hvat orsøkin er til góðu gongdina í løtuni.

- Spælið er farið at glíða frægari, og verjuparturin riggar betur. Hetta var triði dysturin, har vit hildu málið reint, segði Johan, sum í fjør førdi NSÍ til meistaraheitið í sínum fyrsta ári sum NSÍ-venjari.

*Vilt tú so siga, at verjuparturin spældi illa í byrjanini av kappingini?*

- Ja, vit lótu øgiliga nógv mál inn, staðfestir Johan.

NSÍ er nú við aftur í oddastríðnum, men NSÍ-venjarin vil ikki seta sær nakað stórt mál.

- Vit skulu bara halda fast um góðu gongdina. Longur kunnu vit ikki hugsa, vit taka ein dyst á gangin. Hugsar tú longur enn tað, so kemur klutur í, segði Johan Nielsen at enda.

## Besti hálvleikur í ár

B71 tapti fyrra hálvleik 1-0, men málmaður teirra, Símun Rógvi Hansen, heldur, at hetta var besti hálvleikur teirra í ár. B71 kemur sera ofta afturúr, og vit spurdu hann, um teir ikki eru klárir frá byrjan.

- Jú, vit eru klárir, men... Málið hjá teimum var tilvildarligt. Hetta var besti hálvleikur hjá okkum í ár. Vit eru óheppnir ikki at skora. Clayton hevur tveir risa møguleikar, har Tórður (Thomsen, NSÍ-málverji, red.) bjargar tí eina, og hin skjýtur hann beint við síðuna av, peikaði Símun Rógvi á eftir dystin.

Vit spurdu hann, hvussu B71 nú skal bjarga sær lív í Formuladeildini.

- Taka fyrra hálvleik frá í dag við okkum, og berjast víðari. Vit mugu trúgva uppá tað, segði Símun Rógvi, og legði afturat, at teir hava skapt nógvar málmøguleikar í ár, men hava ikki umsett teir til mál.

B71 hevur latið mál inn í hvørjum dysti í ár.